www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 06 - 2012

# Greenpeace kann órógva íslendskar oljuætlanir

Umhvørvisverndarfelagsskapurin Greenpeace hevur sett sær sum mál at forða fyri oljuvinnu norðan fyri pólringin, og eitt tílíkt átak kann ávirka oljuætlanirnar hjá íslendingum. Íslendska stjórnin hevur boðið eitt øki á Jan Mayen-rygginum út til oljuleiting. Økið er á leiðini, sum íslendingar rópa Drekaleiðin, og hon er øll í tí arktiska økinum. Pólringurin er á 66,3 stigum norður, og øll Drekaleiðin er norðan fyri 67 stig. Men pólringurin forðar ikki Greenpeace at mótmæla oljuvinnu sunnan fyri ringin. Eitt nú royndi felagsskapurin at steðga boringini hjá Cairn Energy í Vesturgrønlandi í fjør. Tá boraði felagið á einum øki á 64. breiddarstigi. Grønlendingar vóru heldur ikki serliga fegnir um tiltøkini hjá Greenpeace. Teir vístu á, at felagsskapurin hevði ikki gjørt nakrar roynd at forða norðmonnum at bora í Barentshavinum. Ikki bara Greenpeace Norski umhvørvisverndarfelagsskapurin Bellona hevur eisini sagt seg vera ímóti oljuleiting og møguligari oljuvinnu við Jan Mayen. Tað gjørdi felagsskapurin longu fyri trimum árum síðani, tá norska stjórnin kunngjørdi sínar oljuætlanir við Jan Mayen. Tað eru heldur ikki allir íslendingar, sum eru líka fegnir um ætlanina at leita eftir og útvinna olju norðuri á Drekaleiðini. Eitt nú hevur landsfundurin hjá teimum vinstragrønu samtykt, at Ísland eigur at taka undir við, at tað arktiska økið verður friðað. Flokkurin hevur seinni sagt, at samtyktin umfatar eisini Drekaleiðina, men tinglimir hjá flokkinum hava kortini atkvøtt fyri teimum tingmálunum, sum Altingið hevur samtykt í sambandi við oljuleiting og møguliga oljuvinnu, skrivar Vísir.